# Sámal Blak fekk gávugóðsið

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av eystri og landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 2 og 5 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 1 og 4 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av landsynningi og vátakavi ella kavi. Hitin millum 0 og +3 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og eystri og stundum avfall, partvís kavi. Hitin millum 0 og +4 stig.

**Listamaðurin Sámal Blak, fekk í morgun handað gávugóðs úr Grunni Thorvald Poulsens av Steinum, sum er 60.000 krónur**

MENTAN

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

– Sámal Blak hevur hóast síni bara 23 ár longu víst hegni og fjølbroyttar skapanargávur á fleiri listarligum økjum, segði Elin Súsanna Jacobsen, vararektari á Fróðskaparsetur Føroya, tá hon handaði Sámali Blak gávugóðsið til samkomu á Fróðskaparsetrinum í morgun.

Sámal Blak ger høggmyndir, málningar, pallmyndir og fløguhúsar. Eisini hevur Sámal Blak gjørt planet virðislønina, sum verður latin tónleikarum á árligu Planet Awards.

– Í Føroyum eru umstøðurnar at arbeiða við ymiskum listafólkum so góðar, og tað er ein stórur fyrimunur í mun til at vera í stórbýnum, har tað er skjótt at fella burtur í millum, sigur Sámal Blak.



*Elin Súsanna Jacobsen handar Sámal Blak gávugóðsið á Fróðskaparsetrinum í morgun*
*Mynd: Philippe Carré*

Hann gongur í løtuni á St. Martins College of Art and Design í London, men var komin heim til Føroya at taka í móti gávugóðsinum á Fróðskaparsetrinum í morgun.

Skúlan tekur Sámal fyri at fáa størri avbjóðingar, og ikki minst fyri at síggja heimin, sum hann tekur til.

– Tað er fyri at Sámal skal fáa umstøður at menna seg listarliga, at Grunnur Thorvald Poulsen av Steinum letur honum hesa gávu, segði Elin Súsanna Jacobsen, sum er vararektari á Fróðskaparsetrinum, tá hon handaði Sámali Blak gávugóðsið.

Sámal Blak sigur, at 60.000 krónur má hann royna fáa at strekkja so langt sum gjørligt, tí í London er dýrt at búgva. Hann setir stóran prís upp á at hava fingið gávugóðsið. Ikki bara peningin, men eisini virðingina sum liggur í henni.

– Tað er týdningarmikið, at onkur vísir áhuga fyri tí man ger, heldur Sámal Blak.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -14 |
| Nuuk | 2 |
| Qaqortoq | 3 |
| Ammassalik | -4 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 2 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 7 |
| London | 3 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 3 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 3 |
| Keypmannah. | 6 |
| Helsinki | -5 |
| Moskva | -2 |
| Berlin | 6 |
| Warzawa | 3 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 1 |
| Paris | 8 |
| Madrid | 9 |
| Róm | 14 |
| Malorca | 14 |
| Athen | 5 |
| Malta | 13 |
| Tunis | 14 |
| Beijing | 13 |
| New Dehli | 22 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | -- |
| New York | -5 |
| Miami | 20 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | 15 |
| Panama | 33 |
| La Paz | 17 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 26 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 976 hPa. við Írland stendur mestsum í stað. Eitt hátrýst, 1020 hPa. við landnyrðingspartin av Grønlandi fer spakuliga suðureftir.




**Í dag:**
Lágtrýstið vestan fyri Hebridurnar grynnist. Brúgvalagið haðani verður í høvuðsheitum sunnan fyri Føroyar

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 6/2 kl. $06^{00}$– 7/2. $06^{00}$. Hitin í gjár: 0,9°
Minsti hiti máldur í februar: -11° - Mesti hiti máldur í januar: 11,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 2,0 mm – mált frá 5/2 kl. $06^{00}$– 6/2 kl. $06^{00}$
Avfallið higartil í februar: 15,0 mm








- altíð eitt tiltak miðlahúsinum

**Tiltøk í februar**

**13. februar**
*Pedagogfelagið*

**14. februar**
*Ættleiðingarfelagið*

**15. februar**
*Den Frie Lærerskole*

**18. februar**
*Ferðaleiðarafelagið*

**24. februar**
*Aglow*


## VESTFALLSKYRRINDI

2. februar — Fullmáni
7. februar — Mánin longst frá jørðini
10 februar — Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2007

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 8. Febr. | 10.45 | 23.03 | 09.45 | 22.03 | 10.00 | 22.18 | 00.28 | 12.45 | 01.28 | 13.45 | 09.00 | 21.18 | 08.00 | 20.18 | 11.00 | 23.18 | - | 12.00 | 10.30 | 22.48 | 11.45 | - |
| 9. Febr. | 11.21 | 23.55 | 10.21 | 22.55 | 10.36 | 23.10 | 01.03 | 13.21 | 02.03 | 14.21 | 09.36 | 22.10 | 08.36 | 21.10 | 11.36 | - | 00.18 | 12.36 | 11.06 | 23.40 | 00.03 | 12.21 |
| 10. Febr. | - | 12.28 | 11.28 | - | 11.43 | - | 01.55 | 14.28 | 02.55 | 15.28 | 10.43 | 23.18 | 09.43 | 22.18 | 00.10 | 12.43 | 01.10 | 13.43 | - | 12.13 | 00.55 | 13.28 |
| 11. Febr. | 01.03 | 13.38 | 00.03 | 12.38 | 00.18 | 12.53 | 03.03 | 15.38 | 04.03 | 16.38 | 11.53 | - | 10.53 | 23.13 | 01.18 | 13.53 | 02.18 | 14.53 | 00.48 | 13.23 | 02.03 | 14.38 |
| 12. Febr. | 01.58 | 14.19 | 00.58 | 13.19 | 01.13 | 13.34 | 03.58 | 16.19 | 04.58 | 17.19 | 00.13 | 12.34 | 11.34 | - | 02.13 | 14.34 | 03.13 | 15.34 | 01.43 | 14.04 | 02.58 | 15.19 |